# Hvat sigur løgmaður?

KÁRI P.HØJGAARD
løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin



13 samgongulimir hava skrivað løgmanni bræv, har teir biðja hann seta ein skjóttarbeiðandi bólk, tveir løgtingslimir úr hvørjum samgonguflokki, sum skulu kanna, hvørjir almennir stovnar kunnu flytast út um landið.

Tinglimirnir meta, at bólkurin kann koma við sínari fyrstu niðurstøðu um tríggjar mánaðir.

Teir 13 sum hava skrivað undir brævið til løgmann eru Jógvan við Keldu, Jóhan Dahl, Hendrik Old, Heðin Zakariassen, Alfred Olsen (samgongulimur?), Kjartan Joensen, Jørgen Niclasen, Marius Dam, Gerhard Lognberg, Vilhelm Johannesen, Sverri Midjord, Andrias Petersen og Anfinn Kallsberg.

Løgið at samgongutingmenn meta tað alneyðugt at almannakunngera eina slíka áheitan á løgmann beint áðrenn løgtingsval.

Kann hugsast, at útflutningstørvurin av almennum stovnum úr miðstaðarøkinum er líkaproportionalur við atkvøðutørvin hjá politisku samgonguflokkunum og limunum í ætlaða politiska serfrøðingabólkinum?

Hví geva hesir 13 tinglimirnir Bárði Nielsen landsstýrismanni loyvi til at flyta vælvirkandi virksemi úr útjaðaranum. Gagnar og sparir t. d. niðurleggingin av Toll/Skattstovuni í Klaksvík, norðoyingum, ið nú mugu yvir um fjørðin, tá teir hava ørindi á almenna stovninum?

Dagsins trupulleiki í útjaðaranum er, at útróðurin bløðir spakuliga burtur, og bygdauniversitetini (egningarskúrarnir) lata aftur ein fyri og annar eftir. Hvat gera tit við henda trupulleika?

Hvat kann politiskt gerast við vantandi vinnumøguleikarnar hjá fiski og útróðrarmonnum, ið fækkast í tali, tí fiskidagatalið og harvið inntøkumøguleikarnir verða skerdir á hvørjum ári, og ikki er loyvt at vinna meir enn 50 túsund krónur av øðrum arbeiði, um tú skal verða roknaður sum fullrikin útróðrarmaður?

Hvat við størstu arbeiðsplássunum, flakavirkjunum. Hvat manglar í, áðrenn idé fabrikkin avloysir filé fabrikkina, og hvat skulu tey tímaløntu tá liva av?

Í hesum álvarsmálum ber ikki til at fara út í sjálvdrátti. Harnæst má tryggleiki valda í almennu skipanini, so reglur og avtalur verða hildnar, við virðing fyri starvsfólkunum.

Vit skulu hava førleikakrevjandi arbeiðspláss úti um landið, men hetta má gerast í eini skipari ætlan, har samskipan, serkunnleiki og samfelagsligi ágóðin koma borgarunum í økinum og landinum til góða. Skal útjaðaranum verða lív laga, so má fyrst og fremst fiskivinnan fáa bestu umstøður. Her er brúk fyri at vinnan og politiski myndugleikin tosa saman og finna loysnir í felag.

Um løgmaður gongur áheitanini frá hesum 13 tingmonnunum á møti, og teir fáa loyvi at býta á skinninum, hvar er tá lyfti um opinleika og gjøgnumskygni?

# Generalfadesa av einum generalkonsuli

ROLF GUTTESEN



**Nú hevur Øssur Winthereig vegna sjónvarpið forklára okkum, hví Poul Mohr trein fram á skermin í ”Degi og Viku” herfyri, har hann slapp at hugleiða um sendiharrar, sendimenn, sendistovur, fløgg, gølur og ymsar hendingar á leiðini**

Winthereig sigur í Sosialinum 14.03.07: ***”Vit valdu ein relevantan persón - nevniliga íslendska konsulin í meira enn 20 ár.”***

Tveir dagar frammanundan hevur Poul Mohr tó sjálvur skrivað í Sosialinum í svari til mín: ***”Tað einasta eg iðraði meg um aftaná samrøðuna, (var) at eg ikki segði, at eg ikki úttalaði meg sum sum umboð fyri Ísland.”***

**Har er okkurt galið**

Hesir báðir setningar kunnu ikki báðir vera sannir.

Sendingin var fyri tað mesta upptikin inni í Fútastovu. Poul segði, at hann hevði fingið Fútastovu leigaða til nýggja íslendska generalkonsulatið.

Tað gjørdi hann saktans ikki sum privatmaður?

Og samrøðan – kanska heldur einatalan – snúði seg júst um tað diplomatiska sambandið millum Lýðveldið Ísland og Føroyar.

Hví skuldi ein privatmaður úttala seg um tað, tá man hevur ein undirhaldandi generalkonsul í býnum?

**Dregur Poul í land?**

Tí er mín meting, at Poul nú togar í land.

Har er hann komin at siga nakað, sum ikki hóskar seg einum íslendskum konsuli. So roynir hann nú, aftaná (!) mína viðmerking (ikki sjálvboðin fyri at rætta eina misskiljing) at sníkja seg undan einari generalfadesu av einum generalkonsuli. Hatta er ov neyðarsligt.

Ikki bara hatta, men alt lesarabrævið vísir, at Poul er ein persónur ella diplomatur, sum eingi politisk ella saklig argument eigur. Hoyr bara:

**Brot úr privatari samtalu**

Eg fái at vita at eg eri ”fyrrverandi lektari við Københavns Universitet.”

Tað er púra rætt. Tað fortaldi eg sjálvur fyri Poul fríggjakvøldið 9.2.07 klokkan 18.35 danska tíð, tá eg sat í Kastrup Lufthavn og bíðaði at fara umborð á RC 455 til Føroya. Vit sótu saman eina løtu og prátaðu um leyst og fast.

Men eg dugi ikki at síggja hvat mítt starv ella ikkistarv hevur við hesa sakina at gera. Saktans havi eg nevnt, at Poul var íslendskur konsul. Men tað var tí, at tað var sjálvur krumtappurin í hesi sakini. Men, at eg skuldi fáa partar av privatari samtalu serveraða á hendan hátt, tað hevði eg satt at siga ikki væntað.

**Lógir og konventiónir broytast ikki við herðaklapping**

Eg fái eisini at vita hvar eg búgvi og hvussu leingi eg havi búð har. Hvønn relevans hevur tað fyri hetta mál?

Tað er heldur ikki nakað sakligt - ella bara brúkiligt argument - at fleiri góð fólk hava ringt til Poul og givið honum góðar afturmeldingar. International jura og rættarviðurskifti verða ikki avgjørd við herðaklapping.

At enda skulu lesararnir eisini líka minnast á at Berlin-múrurin er fallin. Poul gitir so, at tað hevði serligar konsekvensir fyri meg. Hann hugsar, at tað **”ivaleyst nívir fyrrverandi lektaran inn á sálina.”** Men amatør-psykologurin steðgar ikki her. Nei, hetta sum nú kemur, er í høvdinum hjá Poul Mohr helst av størsta týdningi fyri at forstanda, hví hann gloymdi at siga, at hann í Fútastovu ikki úttalaði seg sum umboð fyri einari fremmandari makt. Hann er vísur í, at Múrurin í Berlin og allar ismurnar, sum eru rapaðar, hava gjørt, **”at hann (Rolf) hevur mist sín samleika.”**

**Hvør hevur eitt samleikaproblem?**

Man ikki Poul hava eitt samleikaproblem, tá hann hevur so ilt við at skilja millum privatpersónin og konsulin? Marxisman trívist strálandi - ikki sum statsreligión í Sovjet ella Mao-Kina - men sum ein klassisk búskaparteori, sum søguteori, sum vísindaástøði. Eg forvænti ikki, at Poul eigur at vita nakað um alt hetta. Men hann brúkar orðini sum politisk fý-orð, sum kanska sigur eitt sindur um samleika.

**Hvørjir trælir skulu høggast niður?**

Poul Mohr endar sítt lesarabræv soleiðis: ***”Eg sigi, sum tað stendur í Høgnatátti***:.” Her er so seinasta regla av teim fýra endurgivin: ”***at høgga trælir niður***” Uhaddadada? Hvat sigur maðurin? Hvat ætlar hann?

Eg tori slett ikki at gita, hvat hatta kann betýða ella siga um Poulsa samleika, hvørki sum privatpersón ella generalkonsul. Hatta er ikki miðøld, nei heldur oldtíð í einum sokallaðum ”høvdingasamfelagi”, sum við nútíðarhugtøkum helst hevur verið eitt eirindaleyst, antidemokratiskt, ómenniskjaligt mafia-samfelag.

Er tað fyrimyndin?

# Eg havi gjørt eitt roknistykki…

SÚSANNA DAM



Eg havi gjørt eitt roknistykki, sum eg haldi átti at verið sera áhugavert við atliti til uppskotið hjá hinum 13 landspolitikarunum av bygd, sum í hesum døgum eru úti við rívunu eftir at skaffa sær sjálvum meira av skattaborgarans peningi.

Í staðin fyri umleið 300 bý- og bygdarráðslimir, skuldu vit havt umleið 75. Vit høvdu spart eini 33 borgarstjóralønir pluss alt hitt leysa.

Í staðin fyri uml. 3 x 40 fundir at samtykkja kommunalu fíggjarætlaninar, kundu vit sloppið við 3 x 7. Vit høvdu eisini fingið óteljandi nevndarfundur x 7 í staðin fyri óteljandi fundir x 40 til at fyrireika fíggjarætlaninar.

Og so kundu vit havt óteljandi fundir x 7 móti óteljandi fundum x 40 til at avgreiða øll onnur kommunal mál.

Skuldi onkur ivast so er bert at hugsa um, at talið av kommunalum málum eru hvørki fleiri ella færri um talið av kommunum er 7 ella gott 40.

Hendan sparingin hevði verið størst í økjunum, sum teir 13 landspolitikararnir av bygd eru úr, men bæði útjaðari og miðøkini høvdu fingið leysgivið ókenda upphædd og ókenda arbeiðsorku til at hækka livistøðið hjá hvørjum einstøkum borgara, meðan politikkarin, stakalurin, kanska fer at missa onkur gevandi bein, men hann hevur ráð til tað, og kundi kanska verður kravdur eftir onkrum av sínum ágóðum samfelagnum at gagni.

Nú vita vit, at politikarin hugsar bert um politikaran, og til seinasta løgtingsval egndu ein stórur partur av hesum 13 uppskotsstillarum við, at um teir bert sluppu framat, ja so skuldu almennu útreiðslurnar skerjast so at øll kundu fáa tað betur..

Tað var tá, nú er støðan ein onnur, nú skulu útreiðslurnar at vísa seg hækkast í mest møguligan mun, annars fáa vit tað ikki betur.

Í fleiri ár hevur framleiðslan verið minni enn keypiorkan. Júst um dagarnar varð sagt frá at flestu fiskaframleiðsluvirkini hava havt hall á roknskapinum fleiri ár á rað. Rationalisering og effektivisering vóru nógv nýtt orð aftan á kreppuna, men eru helst gloymd í marglætisørsku og oljudansi.

Eitt annað, sum vit eisini hava gloymt, er at í 80'unum lótu landspolitikarnir nógvar skattafríar veitingar og tóku inntøkugrundarlagið frá mongum kommunum eins og frá landskassanum sjálvum.

Tey við almennum inntøkum rinda skatt av hvørji krónu, tey forvinna, meðan somu landspolitikarar hava samtykt at nógvar privat inntøkur – og løgið nokk helst tær stóru - ikki skulu skattast. Onkur kommuna kundi kanska fingið góð hugskot um javnari skattainntøku og kravt landspolitikkaran til at broyta hesi sera sjónsku brek og lýti í skattalógunum, um ikki var so, at lands-og kommunupolitikari í mongum førum eru somu MENN. Pengingarenslið á privata marknaðinum í hesum landinum stendst í mesta munin av óskattaðum peningi, altso skattafríum inntøkum og lánum. Hetta sama, eftir konjunkturunum alt ov stóra privata peningarensl, setur ovurstór krøv til tær almennu veitingarnar, og tað kann einki samfelag liva við. Sjálvt ikki tey annars fyrimyndarligu húsarhaldini á bygd í Føroyum.

Eg sum skattaborgari hava alstóran áhuga fyri at - sagt við orðum Jógvans við Keldu - landspolitikararnir úr útjaðaranum og lokalpolitikkararnir úr miðøkjunum geva mær eina sera neyva og útgreinaða frágreiðing um, hvussu teir ætla at fáa tey viðurskiftini í rættlag, áðrenn teir leggja nýggjar byrðar á meg.

